# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Olevinus Sørensen 50 ár til skips

Vit hava átt og eiga nógvar fiskimenn. Men tað er bert ein lítil partur av teimum, sum eru eitt heilt arbeiðslív á sjónum. Men teir eru kortini nakrir, og teir, sum náða hetta, hava eisini uppiborðið eitt herðaklapp.

Ein av hesum er Olevinus Sørensen av Viðareiði, sum júst ólavsøkudag rakk tey 50 árini á sjónum. Hetta er eitt longri arbeiðslív enn tey ungu í dag kunnu náa við allari ta skúlagongd, tey hava.

Sigast kann, at Olevinus fram um alt er trolaramaður. Ólavsøkudag 1959 fór hann 14 ára gamal við Jóannes Patursson, sum tá var roknaður sum ein framkomin trolari. Her var hann við til "Bóndin", sum hann var kallaður, bleiv lagdur í 1964.

Hann fór so við gamla Sundaberg í 1965 til Sjúrðarberg, fyrsti hekkutrolarin hjá Kjølbro, kom. Olevinus fór við nýggja Sundaberg í 1974.

Nú er tað, at Olevinus fer í rækjuvinnina, har hann nú hevur verið í 30 ár bæði í mótgongd og viðgongd. Fyrst við Karinu og síðan við Betty Belindu. Hann byrjaði sum yvirmaður í 1966.



*Olevinus á brúnni á Arctic Viking í gjár ólavsøkudag. Ja, so framkomin er tøknin*

Hann var nakrar túrir við Ocean Castle, og fór so umborð á Arctic Viking í 1992, og her hevur hann verið síðani. Her umborð helt hann hendan dagin yviri á Flemish Cap.

Bjarni Petersen, skipari á Arctic Viking, sigur um Olevinus, at hann var og er av allar raskastu monnum og sparir ikki seg sjálvan heldur ikki nú á "gamalsaldrinum." Hann er altíð fyrstur har á stendur. Tað er hann, um tað so er at vera hálvur uttanborða á lemminum, tá ið okkurt er slitnað ella at vera undir trolspælinum, um okkurt er fløkt har.

Hann kennir hvønn einasta plink á botni um tað so er á havleiðunum í Barentshavinum/Svalbard - Grønlandi ella Canada.

Bjarni er vísur í, at um man hevði lorað Olevinus á botn onkunstaðni á alt millum 100 og 300 favnar dýpi, so gekk ikki lang tíð til hann hevði kunnað sagt júst á hvørjum kanti ella holu, hann var staddur. Hann kennir allar kantar, nes og holir allastaðni, har fiskandi er á norðurhøvum. Olevinus veit í høvdinum júst hvørja position hann fekk tað ella tað hálið í nítjanhundrað og grønkál.

Hann kennir eisini alt til fugl og fisk, sum vert er at vita, bæði á landi og sjógvi.

Olevinus er giftur við Olevinu, sum eisini er av Viðareiði. Tey eiga seks børn, fýra synir og tvær døtur. Allir synirnir eru sjómenn. Teir eru Hanus, Óli, Eyðstein og Rúni. Allir eru teir navigatørar og av raskastu monnum.

Eystein og Rúni eiga Fiskimúla, sum nú royndarfiskar í Angmassalik økinum eftir svartkalva í samstarvi við Hanus Hansen.

Óli eigur "Olevinu," sum er trolbátur á landleiðini. Hann drívur í løtuni saman við beigganum Hanus bátin Birting hjá Kjartan Joensen í Lorvík.

Døturnar eru báðar giftar sjómonnum. Randi er gift við Júst Poulsen, Jutt, ættaður úr Fugloy, og Sólrun er gift vid Egin Fríða Ørvarodd av Sandi. Tað er tískil ikki ringt at gita, hvar prátað verður um, tá familjan er saman!

Kenni sjálvur Olevinus frá tíðini í fiskimannafelagnum. Kann bert vátta, at hann er skilamaður. Hann er støðufastur og letur seg ikki reka við vindinum. Tað eigur hann eisini at fáa viðurkenning fyri.

**ó.**



*Av brúnni niður á dekkið. Olevinus uttast tv.*

*Framhald av síðu 12*

eitt forskotsgjald. So vítt eg veit, so er hesin pengingur leigugjald frá hesum feløgum í 20 ár. Sigurd kann hóskandi fortelja borgarunum, nær tað er viðtikið, at hetta leigugjaldið skuldið góðskrivast fyritøkunum táið møguliga selt verður.

Í endanum av skrivinum verður sagt, at tunnlarnir eru ein sólskinssøga. Í hesi útsøgn eru vit púra samdir, eg havi ongantíð funnist at íløguni – eigi sjálvur part í fleiri av avgerðunum - ei heldur havi eg annað enn bert gott at siga um Bergfrost og Havsbrún. Kritikkurin er vendur móti Fuglafjarðar býráðið, 9 limir, og ongum øðrum.

Nú hol er komið á kunningarballónina, so kundi verið hóskandi hjá Sigurd at kunna okkum sum ikki hava "innsidevitan" enn meira:

Ein stórur møguleiki er, at kommunalu "primusmotorarnir" í sølutilgongdini eru ógegnigir. Eg spyrji tí: Hvørjir eru teir sum eru ógegnigir í hesum málið? – Jú, rætt er, eg spyrji í fleirtal. Persónur sum er ógegnigur hevur skyldu til sjálvur at boða frá um so er.

At enda skal eg takka fyrisitingini í Fuglafjarðar kommunu fyri, at eg , uttan nakað hóasták, kundi fáa teir upplýsingar sum eftir lógini eru almennir.

## Tøkk

Vit takka tykkum øllum, sum vístu okkum samkenslu, tá kæri sonur, pápi og beiggi okkara

**André Isholm Andrésen**

doyði og varð jarðaður.

**Hildebjørg, Katrin, Ingrid og Birgit**